J. nr. 2012-0902

# Reglugerð fyri uppseting og tøming av ruskíløtum

## 1. Fororð

Heilsu- og Umhvørvisdeildin hevur í samstarvi við Plan og Rakstrardeildina og Lendisdeildina tikið stig til at gera hesa reglugerð fyri uppseting og tøming av ruskíløtum. Tað hava áður ikki verið nakrar ásetingar fyri hvar ruskíløt verða uppsett, frástøða ímillum ruskíløtini og harvið hvussu nógv ruskíløt verða uppsett. Reglugerðin er m.a. eitt amboð, í sambandi við áheitanir frá borgarum, um uppseting av ruskíløtum. Reglugerðin er gjørd við heimild í kunngerð nr. 147 frá 19. oktober 1995 um burturkast.

## 2. Endamál

Við hesi reglugerð er endamálið at:

- forða fyri at rusk rekst ella hópast upp á almennum farleiðum og plássum
- lætta um møguleikan at koma av við rusk
- økja um reinføri og harvið trivnaðin í kommununi.

Við reglugerðini er ætlanin at tryggjað at nóg nógv ruskíløt eru til taks og at hesi verða tømd regluliga eftir tørvi. Hetta verður gjørt, við at ásett er hóskandi fjarstøða ímillum ruskíløtini og at tømingartíttleikan av rusksíløtunum er hóskandi, í mun til hvussu nógv fólk ferðast í ymisku økjunum í kommununi, og harvið hvussu nógv rusk hópast upp.

Umframt fjarstøðu ímillum ruskíløtini ásetir reglugerðin eisini staðseting, snig (litur og stødd) á ruskíløtum, ið verða settar upp til alment reinføri í ymisku økjunum í kommununi.

Reglugerðin er galdandi innanfyri býar- og bygdarmarkið (innangarðs) í Tórshavnar kommunu.

Rusk, nevnt í hesi reglugerð, er at skilja sum tað burturkast, ið gongufólk vanliga hevur tørv á at lata frá sær.

## 3. Økini

Kommunan er býtt sundur í 5 øki, alt eftir hvussu nógv fólk ferðast, og hvat virksemi fer fram í ymisku økjunum. Í býarkjarnuni, og á leiðum, har nógv fólk ferðast, er øki merkt sum ein farleið. Økini eru merkt við ymiskum litum í hjáløgdu kortum. Økini eru lýst í talvu 1. Kortini eru at finna á fylgiskjalinum til reglugerðina.

| Øki / farleið | Litur á korti | Lýsing |
|---|---|---|
| I | Reyð farleið | Býarkjarnan og farleiðir har flest fólk ferðast til gongu |
| II | Blá farleið | Farleiðir frá býi til útjaðara |
| III | Grøn farleið | Ringvegir og bygdirnar |
| IV | Orange øki | Øki við skúlar og ítróttarøki |

Talva 1

Vegir og gøtur til og við skúlar Bústaðarøki og bygdir Viðarlundir, frílendi, almenn frítíðar- og strandarøki, spælipláss, parkeringsøki, sparkivallir ítróttarøki og tílík øki har fólk heldur til.

## 4. Staðseting

Ruskíløtini skulu setast soleiðis, at tey eru os sjónlig og atkomilig sum gjørligt og annars ikki eru til ampa fyri ferðslu. Havast skal í huga, tá ruskíløt verða sett upp, at hesi eisini skulu verða atkomulig hjá rørslutarnaðum. Við atliti til tøming skulu ruskíløt í mestan mun setast tætt vegi, har tað er atkomiligt við bili.

Við viðarlundir, frílendi, almenn frítíðarøki, strandaøki og í privatum bústaðarøkjum, verða ruskíløtini sett upp við inngongdina til hesi øki. Ruskíløtini kunnu verða sett inni í hesum økjum, um so er, at avtalað er gjørd við annan myndugleika ella felagsskap um tøming av ruskílatinum. Um myndugleiki ella felagsskapur, ið avtala er gjørd við, ikki heldur sínar skildur, t.e. m.a. nøktandi tøming, kann kommunan taka ruskíløtini úr økinum, fyri rokning tess, ið av talan varð gjørd við.

Kommunan kann (samb. § 9 í kunngerð um burturkast) áleggja handlum, kioskum o.l. uttanfyri at hava nøktandi tal av ruskíløtum til nýtslu hjá viðskiftafólkunum, og at tøma hesi eftir tørvi.
Til serlig tiltøk, so sum á Ólavsøku, verða settar serligar treytir fyri uppsetan av ruskíløtum. Hetta verður viðgjørt serskilt í hvørjum einstøkum føri.

Á kortinum sæst hvar ruskíløt eru uppsett. Við ymiskum litum er víst ávikavist, verandi ruskíløt og íløt, ið ætlanin er at seta upp. Lendisdeildin dagførir kortið regluliga.

## 5. Snig

Ruskíløtini skulu vera úr sterkum og haldgóðum evni, ið heldur væl móti t.d. rusti. Tey skulu verða evnaði á ein hátt, ið mest møguligt forðar fyri ruski kann fúka tá tað er vindur ella at tað gerst vátt tá tað regnar. Ruskíløtini skulu verða løtt at tøma og støddin á teimum skal samsvara tørvinum á staðnum, har tey verða sett, og tømingartíttleikanum. Liturin á ruskíløtunum skal verða grønur. Posar nýttir til ruskíløtini skulu verða úr evni, sum í minstan mun geva frá sær vandamikil evni tá teir verða brendir.

## 6. Fjarstøða

Fyri hvørt øki, nevnt í stk. 2. eru gjørdar ásetingar fyri fjarstøðu, slag, stødd á rusksíløtunum. Fjarstøðan fyri ymisku økini eru lýst í talvu 2.

| Øki / farleið | Litur á korti | Fjarstøða fyri ruskíløt |
|---|---|---|
| I | Reyð farleið | Í mesta lagi 50 m millum íløtini |
| II | Blá farleið | 50 – 200 m |
| III | Grøn farleið | 200 – 350 m |
| IV | Orange øki | 50 – 100 m |

Talva 2

Tala umstøðurnar fyri at víkja frá ásetingunum í talvu 2, kann umsitingin í serstøkum føri gera frávik frá ásetingunum.

## 7. Tømingartíttleiki

Fyri at tryggjað at rusk ikki rekst ella hópast upp á almennum farleiðum og plássum eru gjørdar ásetingar fyri hvussu ofta ruskíløtini í ymisku økjunum skulu kannast og tømast, um tørvur er á tí.

Reinhaldið tekur støðu til hvørt tørvur er á at tøma ruskíløt. Ansast skal eftir at ruskíløt ikki standa full í longri tíð, soleiðis at vandi er fyri at ruskið fýkur við vindinum.

| Øki / farleið | Kanningar-/ tømingartýttleiki |
|---|---|
| I | Kannast dagliga og tømast um neyðugt |
| II - V | Í minsta lagi kannast eina ferð um vikuna og tømast um neyðugt |

Talva 3

## 8. Ábyrgdarbýti

Plan og Rakstrardeildin hevur ábyrgd av at reglugerðin verður hildin og Reinhaldið røkir skyldurnar sambært hesi reglugerð. Lendisdeildin hevur ábyrgd av at halda korttilfari í tilknýti til reglugerðina dagført. Heilsu- og Umhvørvisdeildin dagførir reglugerðina eftir tørvi. Reglugerðin kemur í gildi, tá hon er samtykt av býráðnum.

Reglugerðin er samtykt av býráðnum 31. mai 2012.




Fylgiskjal 1